# Fortíðin kemur av sær sjálvari - ikki framtíðin

**Høgni Hoydal segði á flokstingi Tjóðveldisins, at framtíðin kemur ikki av sær sjálvari, men tað kemur fortíðin. – Framtíðin er grundarlagið undir tí stríði og teimum málum, sum Tjóðveldi má og skal fremja. Soleiðis hevur tað altíð verið, segði hann**

FLOKSTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síni formansfrágreiðing á flokstingi Tjóðveldisins í Skálavík vísti formaðurin, Høgni Hoydal, á, at Skálavík hevur fostrað mangar mætar kvinnur og menn, bæði skald, vinnulívsfólk, fiski-og útróðrarmenn, stórbøndur og húskallar.

- Skálavík hevur eisini fostrað orginalar sum Klæmint Myllhamar, ið ikki kunnu kopierast. Hann hevur skrivað besta lesarabrævið, eg havi lisið. Klæmint setti pennin beint á, hvussu menningin hevur verið í okkara frælsis-og fullveldisstríði, har so mong hava barst ímóti politikkinum hjá sjálvstýrisrørsluni. Í lesarabrævinum vísti Klæmint á, at bløð og fjølmiðlar eru á tremur við fólki, sum skíra fullveldi ræðuligt og vandafult, og sum ávara sínar landsmenn móti Tjóðveldinum og tí politikki, vit standa fyri og fremja.

Høgni vísti á, at Klæmint í lesarabrævinum skeyt upp at halda nakrar fólkatkvøður um tann politikk, sum sambandsflokkarnir og teirra viðhaldsfólk hava stríðst fyri – ella rættari sagt hava stríðst ímóti.

- Íðan, segði Klæmint. Lat okkum taka tey upp á orðið og halda nakrar fólkaatkvøður. Lat okkum soleiðis hava fólkaatkvøðu um fáa føroyskt úr aftur skúla og kirkju, um at strika Merkið og fara aftur at flagga við Dannebrog, um at koyra fiskimarkið innaftur á tríggjar fjórðingar, um at lata fyrisitingina av undirgrundini frá okkum og um at fáa løgtingið aftur til amtsráð. Ongin svaraði honum aftur!

Klæmint skrivaði lesarabrævið í 2001, og Høgni helt fyri, at skálvíkingurin kundi lagt fylgjandi aftrat í dag:

- Lat okkum hava eina fólkaatkvøðu um at lata ræðið á samfelagsøkjum aftur til Danmarkar, eitt nú skúlamálini og almannamálini. Hesi tóku vit á føroyskar hendur í 2002 og minkaðu soleiðis leigupeningin úr Danmark fyri okkara sjálvræði – tann sonevnda blokkstuðulin – og frystu hann. Nú er hann vorðin minni enn helmingurin av tí, hann var í búskapinum.

## Fortíð og framtíð

Formaður Tjóðveldisins vísti á, at fortíðin kemur av sær sjálvari, men tað ger framtíðin ikki.

- Okkum nýtist sum so ikki at løna politikarum og ráðharrum í Føroyum fyri at leiða okkum aftur í fortíðina ella at verða millumhandlarar fyri avgerðir, ið onnur skulu taka fyri okkum og sum vit ikki hava fólkaræðisliga ávirkan á og ikki kunnu seta nakran til svars fyri. Tað er lítil kunstur at bjóða seg fram í politiskum starvi við tí boðskapi, at onkur annar skal gjalda og taka ábyrgdina fyri okkum.

Høgni Hoydal segði, at framtíðin kemur ikki av sær sjálvari. Hon er grundarlagið undir tí stríði og teimum málum, sum Tjóðveldi má og skal fremja. Soleiðis hevur tað altíð verið.

- Ein, sum støðugt krevur at vita prísin á øllum, finnur ikki virðið í nøkrum.

Hann segði, at alt tað, sum er okkum allar kærast í dag, alt tað, sum ger okkum errin og byggir framtíðina, alt tað, sum bindur okkum saman og gevur okkum okkara pláss í heiminum. Hetta eru júst tey mál og tey frambrot, sum so nógv bardust ímóti og sum skiltu okkum so nógv í fortíðini.

Høgni segði, at fyri hann persónliga er tað serstakt at halda tjóðveldisting í Skálavík, tí í Skálavík er eisini hansara upphav.

- Tippoldurabbi mín var Jógvan á Oyruni í Skálavík. Hann var tiltikin heimadoktari og í heimaráðum. Jógvan varð sagdur at duga at mana og meira enn at mata sær. Hann var serstakur í útsjónd. Haldi, at Viderø skrivar, at Jógvan var sum ein illa laðaður varði. Kortini setti hann nógvar væl laðaðar varðar eftir seg. Jógvan var fyri stórum missi, tá børnini doyðu frá honum av vanlukkum. Langabbi mín Dánial vaks fyri ein stóran part upp hjá Jógvani á Oyruni, segði floksformaðurin.

# Eingin framtíð

**- Byggja vit ikki á felags virðir og virðing, sum hvør einstakur kennur seg aftur í og kennir seg hava ávirkan á, er ongin framburður møguligur. Seta vit blint okkara álit á blindar kreftir sum pengar, kapital, vísindi ella lærur um, hvussu søgan fer at enda, so skapa vit gróðrarbotn fyri meiningsloysinum, segði Høgni Hoydal á flokstinginum**

FLOKSTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á flokstinginum gjørdi Høgni Hoydal eisini nógv burtur úr altjóða fíggjarkreppuni, sum hann heldur hevur avdúkað, at tær politisku skipanirnar, ið skuldu umboða fólkið og gera framtíðartryggar loysnir fyri komandi ættarlið, hava gjørt beint tvørturímóti.

- Tær politisku skipanirnar hava bæði slept allari stýring og forsømt eftirlitið við einum fíggjarheimi, sum hevur sprænt pengar út í einum altjóða pokerspæli, har eingi verulig virði vóru aftanfyri. Politisku skipanirnar hava hartil eggjað til hetta pokerspæl við neo-liberalum hugsjónargóðsi, sum helt uppá, at tess minni spekulantar og fíggjargandakallar rindaðu til felagsskapin og stóðu til svars fyri politiska myndugleikanum, tess meiri skuldi ævigur vøkstur skapast.

Floksformaðurin segði, at altjóða fíggjarmarknaðurin, sum í fyrsta lagi støðugt hevur sett alt fólkaræði og politiskar skipanir í skák, setur nú eisini alt tað politiska valdið í heiminum í mát: Tað, ið var altjóða mál og privat ogn, tá vinningurin skuldi vinnast, gerst nú aftur ábyrgd einstakra tjóða og alment mál, tá rokningin skal gjaldast og uppruddingin fara fram.

Hann vísti á, at føroyski búskapurin og føroysku fíggjarstovnarnir hava ikki verið fremstir í teimum leikum, sum hava elvt til altjóða fíggjarkreppuna.

- Staðfestast kann, at tað hevur verið ein fyrimunur, at føroyska bankakervið hevur verið rikið lutfalsliga varisliga eftir bankakreppuna í 1992, og at útrásirnar á aðrar marknaðir hava ikki vundið uppá seg fyrrenn seinastu fáu árini. Men føroyskur politikkur og búskapur hevur tíverri verið stýrdur av somu hugsanum, sum liggja aftanfyri atvoldirnar til altjóða fíggjarkreppuna.

Og floksformaðurin helt fram:

- At byggja á fígging og pening, har eingin verulig framleiðsla og virði liggja aftanfyri. Har vit halda, at ein innspræning av peningi uttanífrá kann skapa haldføran búskap. Har politiska skipanin eggjar til spekulasjón og forsømir at stýra teimum ótalmaðu kreftunum á fíggjarmarknaðinum.

Høgni Hoydal spurdi, um hetta ikki júst eru ryggirnar av okkara egnu kreppum og okkara egnu húsagangum undir heimastýrinum.




- Skatta- og búskaparpolitikkurin hjá undanfarnu ABC-samgongu bygdi á júst somu hugsjónir um monetarismu, sum Thatcher, Reagan, Bush yngri við hugmyndunum hjá Milton Friedman hav gingið á odda fyri. Har skattalættar og innspræning av peningi til teir sterkastu samfelagsbólkarnar og fíggjarheimin,



*- Títt stríð, tínar hugsjónir og tíni avrik skulu næla, veksa og bera frukt, segði Høgni Hoydal um farna partamann sín, Finn Helmsdal*

# Vit sakna teg sáran, Finnur

**- Tá vit líta aftur á árið, sum er farið, hugsa vit eisini um fólk, sum hava stríðst saman við okkum, men sum ikki eru millum okkum longur, segði Høgni Hoydal, floksformaður, tá flokstingið mintist farnar stuðlar**

FLOKSTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síni formansfrágreiðing nam Høgni Hoydal eisini við kenslurnar, sum renna fram, tá litið verður aftur á árið, sum er farið, síðan flokkurin helt seinasta floksting við Gjógv fyri einum ári síðan.

- Fólk, sum hava stríðst saman við okkum og fyri okkum, eru ikki millum okkara longur. Okkara tankar leita til teirra við takksemi – og okkara hjørtu leita til teirra næstu við samkenslu. Eg fari at loyva mær at nevna serstakt tingmann okkara og sosiala stríðsmannin, Finn Helmsdal, ið so bráddliga noyddist at leggja árarnar inn.

Og Høgni Hoydal legði aftrat:

- Vit sakna teg sáran, Finnur, og lova tær, at títt stríð, tínar hugsjónir og tíni avrik, skulu næla, veksa og bera frukt. Vit finna ugga í vísdómsorðunum: Heldur missa teg enn ongantíð at hava kent teg, legði hann aftrat.

Á flokstinginum í Skálavík reistist fundarfólkið og mintist tey, sum mist eru, í tøgn eina stund.